

# KANSKA-LANDIÐ

**G!-FESTIVALURIN** Brandur Enni, sum er føroyska barnastjørnan, var á palli leygarkvøldið kl. 20. Framførslan var søt og romantisk, men serliga góða violinspælið var ein góð barlast til tað sukursøta

Sissal Kampmann

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leygardagurin á G! var eisini ringur at spáa um frammanundan. At Føroyar vera kallaðar The land of maybe, var avgjørt ikki gjørt til skammar, tí allur dagurin var ein blanding av sól, regni, vindi og enn meiri kaosi.

Í veruleikanum mangladi bert at tað fór at kava, men so illa stóð tó ikki til. Men fyri at tað ikki skuldi vera lygn, fór streymurin mitt í tí heila um middagsleitið leygardagin, og Gøta lá í streymloysi í fleiri tímar. Hetta ávirkaði sjálvsagt allan festivalin, men, um tað skal ganga galið, so hví ikki lata tað ganga heilt galið? Streymurin kom tó aftur í aftur, og tá konsertirnar so smátt byrjaðu niðri á pallinum, Fyri oman Brúgv, um fýra-fimm tíðina var eitt sindur av fólki komið at lurta. Tað regnaði illa, og tað tóktist, sum gestirnir eftirhondini høvdu vant seg við, at soleiðis var veðrið bara í ár, og tað var tað.

### Vorðin vaksin

Tá tað leið móti kvøldi var túrurin komin til 20 ára gamla Brand Enni, sum í løtuni er búsitandi í Svøríki, har hann lærir til lagasmið. Tað eru stórar vónir til Brand, sum verður mettur at fara at klára seg væl í altjóða poppheiminum. Hann hevði útgávusáttmála, áðrenn hann var liðugur at útbúgva seg, og hetta skuldi borga fyri góðsku, um einum dámar popptónleik.

Brandur gav sína fyrstu fløgu út sum 12 ára gamal, og hann er helst tað tættasta ein kemur til eitt skapað poppfyribrigdi. Brandur er harumframt tað tættasta vit koma til eina barnastjørnu í Føroyum, og hann var ótrúliga væl umtóktur um aldarskiftið, tá barnastjørnur vóru eitt serstakliga populert fyribrigdi í norðurlondum. Sum bert 13 ára gamal var hann heimsstjørna í Føroyum, serliga kendur fyri lagið, Waiting in the moonlight.

Nú hevur hann givið sína fyrstu fløgu út sum vaksin, Sometimes truth needs a lie, og við hesum markerar hann eitt skift í síni karrieru sum tónleikari. Tað, ið kanska er serliga áhugavert, er, at tað er Christoffer Lundquist, ið áður hevur arbeitt saman við m..a. Roxette, Per Gessle, Ulf Lundell, Moneybrother og øðrum kendum nøvnum, sum hevur framleitt fløguna hjá Brandi.

### Søtt, men gott

Veðrið var ordiliga gott í mun til, hvat tað hevði verið, tá Brandur fór á pall á G! fyri at spæla sín tónleik fyri áhoyrarunum. Tá hann fór á pall á spæliplássinum uml. kl. 19, var komið eitt sindur av fólki komið oman á spæliplássið at lurta eftir tvøramanninum, ið hóast sín unga aldur hevur nógv ár á baki í føroyskum tónleiki. Tað legðist alsamt meir fólk til, sum konsertini leið.

Tónleikurin, Brandur framførdi leygardagin á G!, var melidiøsur popp/rokkur við einum fólksligum ískoyti, ið serliga kom fram við violinspælinum hjá Angeliku Nielsen. Angelika megnaði við violini at lyfta tónleikin longur, enn hann vildi komið, um hon ikki var við. Tað var, sum um hon tók broddin av tí, ið lætt kundi blivið eitt sindur søtsuppuagtigt.

Tónleikurin hjá Brandi var kanska meir følin enn kensluborin, og av og á bleiv tað í so romantiskt og forútsigiligt reint tónleikaliga. Men av tí, at Brandur hevur eina sera vakra rødd, sum uttan trupulleikar kann bera slíkan tónleik, bleiv tað ikki irriterandi, men heldur ein konsert, har man fann seg sjálva standa og murra við sangunum hjá Brandi, um eg vildi tað ella ei.

# Vit hava ikki eina madrass í part

**G!-FESTIVALURIN** Páll Finnur Páll er helst tann bólkurin í Føroyum, ið megnar at savna flest fólk til konsertir. Um tað er í Keypmannahavn ella í Føroyum, koma fólk streymandi í so stórum mongdum, at tað ikki er pláss fyri øllum

Sissal Kampmann

Øll vilja hoyra teirra fangandi og melidiøsu løg, syngja við og hoyra teirra stuttligu tekstir, sum tó so ofta hava ein týdningarmiklan, undirliggjandi boðskap, ið er verður at taka til eftirtektar. Teir eru helst tað, ein kann kalla røddin hjá tí unga fólkinum í landinum, og stemningurin er altíð fantastiskur, tá teir spæla.

Eg kann ímynda mær, hvussu stuttligt tað má vera hjá teimum at standa á pallinum og síggja so nógv fólk skróla við sangunum, teir hava skrivað. Ikki minst er tað óbeskriveliga gott, deiligt og positivt at síggja og hoyra hesar væl samanspældu menninar, sum allir hava eitt forherað glimt í eyganum, sum ikki ber til at standa ímóti. Teir syngja um alt tað, eingin hevði droymt um at torað at fýrt av fyri bara 10 árum síðan. Men tað er fantastiska gott og gleðiligt at síggja og hoyra, at tíðirnar eru broyttar, og at vit eru við at førka okkum inn í modernitetin. – Tað var eisini uppá tíðina.

### Óvanliga fáir áhoyrarar

Fríggjanáttina kl. ræðuliga seint fóru Páll Finnur Páll so á pall, og hóast tað vanliga er stúvstappað til konsertirnar hjá teimum, so var spæliplássið ikki meir enn umleið tveir triðingar fult. Tað er ongin ivi um, at fleirtalið av G!gestunum hoyra til tann aldursbólkin, sum eigur Páll Finnur Páll, eins og aðrir aldursbólkar áttu Frændur, Harkaliðið, Enekk osfr., og tí undrar tað, at spæliplássið ikki var á tremur.

Um hetta stóðst av veðrinum, seinu framførsluni ella onkrum heilt triðja, skal eg ikki kunna siga, men trupulleikin var ikki hann, at teir ikki leveraðu vøruna akkurát, sum teir skuldu. Í reyðum skjúrtum og svørtum slipsum byrjaðu teir í toppformi. Henda formin hildu teir gjøgnum alla konsertina. Teir spældu alt tað, fjøldin vildi hoyra og góvu teimum tað, tey høvdu bíðað eftir.

Tey, ið vóru á konsertini, høvdu eina supergóða uppliving, har ljóðið var finasta slag, og har tey fingu møguleika at dansa og syngja, eins og tey høvdu havt við Eivør frammanundan.

So Sigøjnarin á vaglinum, tey heimleysu og allir hinir figurarnir hjá Páll Finnur Páll vunnu flog á gøtuhimmalinum, har regnið enn einaferð síláði niður hetta vikuskiftið, ið helst var eitt tað vátasta í laaaaanga tíð. Hetta var hinvegin kanska eisini einastu ferð flestu áhoyrararnir hjá Páll Finnur Páll ikki høvdu eina madras í part, og so kann mann kanska læra eitt sindur av tí, gleða seg til at koma heim aftur til sivilisatiónina og taka alt kaosið sum eina uppliving, ið er verd at minnast fyri tað hon var.